# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundinum 02.09.2019*

**Bygdaráðsfundur 02.09.2019 kl. 18.00 til kl. 19.00**

| | | |
|---|---|---|
| **Fundarstað:** | **Fundarhøli** | |
| **Hjástødd**: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Kaj Eli Hansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Selma Hansen. skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 54/2019 Afturkeyp av grundstykki – Lukkað mál**
J.nr. 02.34.02-P07-1-18

**Mál nr. 55/2019 Eykajáttan til Tofta havn – 1. viðgerð**
J. nr. 00.32.10-S08-3-18

**Málslýsing**
Meira viðlíkahalds- og uppruddingararbeiði er gjørt á havnalagnum higartil í ár enn roknað er við í fíggjarætlanini fyri 2019. Tørvur er tískil á eini eykajáttan til rakstur.

Grundað á raksturin fyri fyrstu 7 mðr. er framroknað fyri restina av árinum. Mett verður, at tørvur verður á eini eykajáttan uppá uml. kr. 210.000.

**Tilmæli**
Á fundi tann 30.08.2019 mælir Fíggjarnevndin til at játta kr. 210.000 eyka til rakstur av havnini. Peningurin verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt

**Mál nr. 56/2019 Hækkan av játtanini til Roðan Økistænastuna fyri 2019 – 1. viðgerð**
J.nr. 00.32.10-S08-2-18

**Málslýsing**
Sambært javnbjóðis samstarvsavtaluni millum kommunurnar á Skálafjørðinum um Økistænastuna Roðin, verða útreiðslurnar av økistænastuni býttar samsvarandi tali av borgarum, ið 31. desember árið fyri eru 67 ár og eldri. Hetta er eisini í samsvar við løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um heimatænatænastu, eldrarøkt v.m.

Tað vil siga, at útreiðslurnar av rakstrinum í 2019, verður býttar eftir fólkatalinum pr. 31. desember 2018.

Fíggjarætlanin fyri 2019 var gjørd í sept. 2018, og var fyribilsbýtið tá grundað á fólkatalið pr. 31. desember 2017.

Nú eru fólkatølini pr. 31. desember 2018 tøk, og endaligur býtislykil fyriliggur.

*Býtislykil:*

| | 31/12-17 | % | 31/12-18 | % | Br. fólk |
|---|---|---|---|---|---|
| Nes kommuna | 168 | 18,12 | 179 | 18,84 | +11 |
| Runavíkar kommuna | 597 | 64,40 | 610 | 64,21 | +13 |
| Sjóvar kommuna | 162 | 17,48 | 161 | 16,95 | -1 |
| **Íalt** | **927** | **100,00** | **950** | **100,00** | **23** |

Sum uppgerðin vísir, eigur Nes kommuna lutfalsliga størri part av rakstrarútreiðslunum fyri 2019, enn ásett í fíggjarætlanini. Meirkostnaðurin er kr. 499.624.

**Tilmælir**
Á fundi tann 22.08.2019 mælir Trivnaðarnevndin til, at nýggja uppgerðin verður góðtikin, og at meirkostnaðurin verður goldin Roðanum.

Á fundi tann 30.08.2019 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá Trivnaðarnevndini og vísir á, at inntøkan viðv. eftirlønarskatti fyrstu 7 mðr. er kr. 554.188 meir enn áður mett. Peningurin verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælini hjá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt

**<u>Mál nr. 57/2019 Innbúgv til miðhøllina í Toftaskúla</u>**
<u>J.nr. 82.04.00-P20-1-19</u>
**Málslýsing**
Í skrivi 05.07.2019 søkir Tofta skúli um pening til at keyp av innbúgvi til miðhøll skúlans. Talan er um borð og stólar, ið er forfarið síðan nýggi skúlin lat upp í 2008.

Tofta skúli hevur gjørt tørvin upp og hevur fingið tilboð frá sama veitara, sum hevur leverað verandi innbúgv. Kostnaðurin er kr. 55.386, íroknað 6,25% í kommunalum mvg.

**Tilmælir**
Á fundi tann 21.08.2019 mælir Mentanarnevndin til at játta kr. 55.386,- til innbúgv til miðhøllina í Tofta skúla.

Á fundi tann 30.08.2019 tekur Fíggjarnevndin undir við tilælinum hjá Mentanarnevndini og mælir til, at peningurin verður tikin av stovninum skúlin.

**Avgerð**
Tilmælini hjá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt

**Mál nr. 58/2019 Spæliplássið á Saltnesi**
J.nr. 04.03.00-P20-4-16
**Málslýsing**
Í skrivi 19.07.2019 søkir nevndin fyri spæliplássið um stuðul til spæliplássið á Saltnesi, sum skal nýtast til reiggjur og sand vm. Mettur kostnaður er kr.10.000.

**Tilmælir**
Á fundi tann 21.08.2019 samtykti Mentanarnevndin at játta kr. 10.000 til spæliplássið í 2019. Peningurin verður tikin av stovninum sparkivallir og spælipláss.

Á fundi tann 30.08.2019 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini hjá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 59/2019 – Asfaltering av økinum við bygningin hjá Sandgrevstur**
J.nr. 08.03.25-P20-2-17
**Málslýsing**
Arbeiðið við høllini, sum Sandgrevstur hevur bygt á havnaøkinum, er komið væl áleiðis. Kommunan hevur lagt leiðingar og planerað kring høllina. Eftir er nú at asfaltera økið.

Tekniska deild hevur biðið veitarnar EM Asfalt og Kreton um tilboð til at asfaltera 963 m².

**Tilmælir**
Á fundi tann 20.08.2019 mælir Tekniska nevnd til at taka av lægra tiboðnum frá Sp/f Kreton, áljóðandi kr. 358.116, uttan mvg.

Á fundi tann 30.08.2019 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd og mælir til at peningurin verður tikin av stovninum Havnin íløga.

**Avgerð**
Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt

**Mál nr. 60/2019 Keyp av nýggjum bili til teknisku deild**
**J.nr. 83.11.01-G01-1-19**
**Málslýsing**
Bilurin, sum teknisku deild hevur brúkt til at salta við, stendur fyri umfatandi umvælingum.
Bilurin er gott 12 ára gamal.

Havandi aldurin og komandi rakstrarútreiðslur í huga, hevur leiðarin á teknisku deild kannað ymiskar møguleikar, og mælir til keyp av nýggjum bili. Bilurin skal verða líknandi verandi bili og eigur at verða keyptur áðrenn veturin byrjar.

**Tilmælir**
Á fundi tann 20.08.2019 mælir Tekniska nevnd til, at gamli bilurin verður seldur, og ein nýggjur keyptur. Tekniski leiðarin finnur hóskandi bil.

Á fundi tann 30.08.2019 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd og mælir til at játta upp til kr. 400.000. Mælt verður til, at fyrisitingin avgreiðir málið. Peningurin verður tikin av stovninum reinsiverkið íløga.

**Avgerð**
Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt

**Mál nr. 61/2019. Girðing vestanfyri fótbóltsvøllin**
J.nr 82.07.00-P20-1-15
**Málslýsing**
Arbeiðið viðv. málgoymsluni við norðara fótbóltsvøllin á Svangaskarði er ikki liðugt.
Stoyping av betonggarðum manglar, eins og hegn manglar vestanfyri vøllin.

Áheitan er komin frá borgara um at fáa gjørt arbeiðið liðugt viðvíkjandi málgoymsluni, og fáa uppsett hegn á vestari síðu.

Peningur er ikki avsettur til hetta arbeiðið í 2018.

Málið bleiv eisini viðgjørt á bygdaráðsfundinum 25.03.2019, og tá var einmælt samtykt at koyra málið aftur í nevnd.

Síðani er arbeitt við ymiskum møguleikum.

**Tilmælir**
Á fundi tann 20.08.2019 mælir Tekniska nevnd til, at garður verður stoyptur fyri allan norðurendan, t.v.s 90 metrar, og pelar settir í. Hegnið verður at bíða til endaligi kostnaðurin av garðinum fyriliggur.

*Tekniski leiðarin hevur gjørt eina nýggja meting samb. tilmælinum frá Teknisku nevnd, hon ljóðar á kr. 251.050 u/mvg og kr. 268.000 v/6,25% mvg.*

Á fundi tann 30.08.2019 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd og mælir til, at arbeiðið verður fíggjað soleiðis. kr. 80.000 løn til arbeiðsmenn flutt frá vegir, kr. 34.000 flutt frá sparikvallir og spælipláss og kr. 154.000 flutt frá rentuútreiðslunum, í alt kr. 268.000.

**Avgerð**
Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 62/2019 Loyvi at keypa lendi til bilhús**
J.nr 02.34.02-P20-21-19
**Málslýsing**
5. juni 2019 kemur fyrispurningur frá Hans Erik Jensen um tilsókn um loyvi til bilhús á matr.nr. 508.

**Tilmæli**
Á fundi tann 20.08.2019 mælir Tekniska nevnd frá at geva loyvið, við tí grundgeving, at í økinum er tætt bygt, og grundstykkini smá. Hildið verður ikki, at ráðiligt er at ogna sær aðrar matriklar til tílíka bygging.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 63/2019 Bátahylurin- Modelroynd**
J.nr. 08.03.26-P20-1-19
**Málslýsing**
Tað hevur verið leingi kent, at ókyrt er í bátahylinum á summum ættum. Nógvar ymiskar loysnir hava verið nevndar. Fyri at hava betur grundarlag fyri støðutakan, um hvat gerast skal við trupulleikan, hevur møguleikin við modelroyndum verið viðgjørdur í kommununi.

Talan er um telduviðgjørdar modelroyndir, sum verða nógv nýttar í dag. Ein tílík roynd kostar áleið 40 - 50.000 kr.

**Tilmælir**
Á fundi tann 20.08.2019 mælir Tekniska nevnd til, at modelroyndir verða gjørdar.

Á fundi tann 30.08.2019 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd og mælir til, at peningurin verður tikin av játtanini til bátahylin Gátt, undir stovninum havnin íløga.

**Avgerð**
Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt

**Mál nr. 64/2019 Fossdalsbakki – møgulig rudding**
J.nr. 09.00.00-P20-1-19

Semja var um, at málið bleiv tikið av skrá og koyrt aftur í Tekniska nevnd.

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundinum 02.09.2019*

**Mál nr. 65/2019  Ferðsluviðurskiftini á Brekkukletti**

J.nr. 05.13.01-P20-1-19

**Málslýsing**

Tann 12. august 2019, kemur skriv frá borgarum sum búgva á Brekkukletti. Tey siga, at bilarnir har í økinum koyra alt ov skjótt. Tey ynskja, at okkurt verður gjørt fyri at dempa ferðsluna.

**Tilmæli**

Á fundi tann 20.08.2019 mælir Tekniska nevnd til at seta 30 km skelti upp.

**Avgerð**

Tilmælið hjá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 66/2019  Loyvi til havastovu**

J.nr. 02.34.02-P20-30-19

**Málslýsing**

Í skrivi dagf. 10.08.2019 søkir Hilmar Højgaard um byggiloyvi til eina havastovu. Havastovan verður sett á verandi altan niðanfyri húsini, men verður longd soleiðis, at hon eisini verður sunnanfyri húsini.

**Tilmæli**

Á fundi tann 20.08.2019 mælir Tekniska nevnd til at geva byggiloyvið sambært frágreiðing og tekningum.

**Avgerð**

Tilmælið hjá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 67/2019 Útbjóðing av vegagerð við Høganesveg**

J.nr. 02.11.00-P20-3-17

**Málslýsing**

Verkætlanin umfatar gerð av 350 m av asfalteraðum vegi við gongubreyt, íroknað klokk- og spillvatnsleiðingar og gøtuljós.

9 arbeiðstakarar vóru bodnir at bjóða, og 4 lótu tilboð inn. Teknistovan Gøta hevur staðið fyri projektering og útbjóðing. Tilboðini eru hesi:

| | |
|---|---|
| RTS | kr. 4.600.310 |
| Falkon | kr. 4.394.500 |
| Voyt | kr. 4.289.720 |
| JHR | kr. 3.728.780 |

Teknistovan mælir til, at Nes kommuna tekur av lægsta tilboðnum, sum er frá JHR.

**Bygdaráðið samtykti at taka undir við tilmælinum.**

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundinum 02.09.2019*

**Kunning:**

**Hálvársroknskapurin hjá Nes kommunu fyri 2019.**

| **Rakstur** | **Pr. 31.06.19** | **Fíggjarætlan 2019** | **Munur** | **%** |
|---|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyristingar | 2.230.410 | 4.788.000 | 2.557.590 | 53,4% |
| §2 Almanna- og heilsumál | 8.354.053 | 16.686.000 | 8.331.947 | 49,9% |
| §3 Børn og ung | 5.280.164 | 11.215.000 | 5.934.836 | 52,9% |
| §4 Undirvísing | 1.953.960 | 3.890.000 | 1.936.040 | 49,8% |
| §5 Mentan og frítíð | 1.900.861 | 3.795.000 | 1.894.139 | 49,9% |
| §6 Teknisk mál | 1.733.262 | 4.402.000 | 2.668.738 | 60,6% |
| §7 Kommunal virki | 1.969.122 | 3.092.000 | 1.122.878 | 36,3% |
| **Rakstur í alt** | **23.421.832** | **47.868.000** | **24.446.168** | **51,1%** |
| | | | | |
| §20 Inntøkur v.m. | -30.107.235 | -54.642.000 | -24.534.765 | 44,9% |
| | | | | |
| **Rakstur pr. 31.06.2019** | **-6.685.403** | **-6.774.000** | **88.597** | **1,3%** |

| **Íløgur** | **Pr. 31.06.19** | **Fíggjarætlan 2019** | **Munur** | **%** |
|---|---|---|---|---|
| §2 Almanna- og heilsumál | 0 | 141.000 | 141.000 | 100,0% |
| §3 Børn og ung | 605.759 | 5.000.000 | 4.394.241 | 87,9% |
| §4 Undirvísing | 819.607 | 1.101.859 | 282.252 | 25,6% |
| §5 Mentan og frítíð | 850.849 | 1.800.000 | 949.151 | 52,7% |
| §6 Teknisk mál | 2.467.761 | 5.700.000 | 3.232.239 | 56,7% |
| §7 Kommunal virki | 4.802.426 | 9.030.000 | 4.227.574 | 46,8% |
| **Íløgur í alt** | **9.546.402** | **22.772.859** | **13.226.457** | **58,1%** |
| | | | | |
| **Íløgur og rakstur í alt** | **2.860.999** | **15.998.859** | **13.137.860** | **82,1%** |